





# Vágafólk

## Dýrabiðidagsstevna verður í Missiónshúsinum Libanon í Sørvági í døgunum 4.-6. mai 2007.

**Fríggjadagin 4. mai**
kl. 15. Stevnan verður sett á Pálsoyruni, við handilin Samkeyp. Marni av Kák og Harald Haraldsen seta stevnuna. Streingjakórið í Sørvági syngur.
Um tað ikki viðrar verður farið í missiónshúsið.
Kl. 19 »syngi við kvøld« við ymiskum sangbólkum, duo- og solosangi, harmoniku spælarar vera við.

**Leygardagin 5. mai**
Kl. 10. Sangur og lovprísan og forbøntænasta.
Kl. 19. Møti í missiónshúsinum.
Kl. 23. Ungdómur møtir ungdómi

**Sunnudagin 6. mai**
Kl. 14. Sunnudagsskúli
Kl. 16. Møti í missiónshúsinum
Kl. 19.30. Møti í missiónshúsinum

**Hesi koma at luttaka á stevnuni við talu, sangi og vitnispurði:**
Jógvan Lamhauge, Regin Drangberg, Hjalgrím Davidsen, Árni Kjærbo, Hendrik Olsen, Johannis Danielsen, Thomas J. Askham, Hallmar og Hedvig Winther, John og Solveig Joensen, Hanna og Terji Jacobsen, Magni Christiansen, Ungdómskórið í Sørvági, Eclesia, Oasubrøðurnir, luttøka av harmonikuspælarunum Nimrod og Ebba Midjord.

Við kvøldmøtini verður innsavnan til missiónshúsið og arbeiðið í Rumenien.

Fríggja- og leygarkvøldið verður ein drekkamunnur eftir møtini.

Sunnudagin millum møtini verður heitur rættur v.m.

Vit bjóða øllum hjartaliga vælkomnum til stevnuna, har boðskapurin um mannin frá Nasaret, Jesus Kristus, er í centrum.

Les heimasíðuna www.123hjemmeside.dk/jofri

***Vælkomin til stevnuna!***

**Heb. 13,8** *»Jesus Kristus er í gjár og í dag hin sami og um allar ævir.«*

**Stýrið fyri Missiónshúsið**

# Starv á Føroya Barnaheimi

Barnaheimið søkir við hesum eftir avloysara til Ungdómsdeildina, fyri starvsfólk sum fer í farloyvi.

Starvið ið er eitt fulltíðarstarv er leyst til setan í tíðarskeiðnum 15.06.2007 – 31.05.2008. Tann ið settur verður í starvið, skal starvast í skiftandi vaktum á Ungdómsdeildini, har tað er pláss fyri 6 børnum í aldrinum 12 – 18 ár. Harumframt er eitt bráðfeingispláss.

**Um Ungdómsdeildina:**
Á Ungdómsdeildini eru 8 fólk í starvi, øll við viðkomandi útbúgving.

Endamálið við arbeiðnum á Ungdómsdeildini er, at støði verður tikið í tí einstaka barninum, har dentur fyrst og fremst verður lagdur á umsorganina, vegleiðingina og eygleiðingina. Skaptir verða karmar rundanum barnið, soleiðis at reglusemi kemur í gerandisdagin. Tá talan er um tørvir og ynskir hjá barninum, verður altíð í hvørjum einstøkum føri tikið hædd fyri aldur og førleika annars.

**Førleikakrøv:**
Vit sóknast eftir einum starvsfólki, ið hevur ávísan kunnleika til at arbeiða við børnum og ungum. Tað er umráðandi, at viðkomandi hevur fakligan áhuga og góð samstarvsevni. Tann ið settur verður, skal kunna arbeiða sjálvsstøðugt.

Ein partur av arbeiðnum er skrivligt arbeiði, og umráðandi er, at viðkomandi dugir væl at málbera seg bæði í skrift og talu.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 14.05.2007.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Djóna N. Joensen, deildarleiðara ella Beintu Johannesen Mørkøre, leiðara á tlf. 312320

**Føroya Barnaheim**
Pedda vid Steingøta 10
100 Tórshavn







